## Danskir fiskimenn í øðini

Í dag koma tær nýggju fiskiveiðireglurnar hjá ES í gildi. Reglurnar umfata millum annað toskafiskiskapin í Norðsjónum og hava til endamáls at varðveita stovnin, men donsku fiskimenninir hava longu gjørt greitt, at teir ætla sær ikki at gera eftir nýggju reglunum.

Reglurnar áseta millum annað, hvussu nógvar fiskidagar hvørt skip kann hava, samstundis sum kvotan er munandi skerd. Men sambært fiskimonnunum letur tað seg ikki gera at halda reglurnar. Teir siga, at skulu teir gera, sum reglurnar siga, fara teir allir á húsagang. Tí ætla fiskimenninir at fiska, sum vóru gomlu reglurnar framvegis í gildi.

Danska fiskimannafelagið hevur boðað frá, at tað styðjar sínar limir, og formaðurin í felagnum, bent Rulle, segði fyrrakvøldið við danska sjónvarpið, at hann fer ikki at mæla sínum limum til at halda nýggju reglurnar. Hetta fall ikki í góða jørð hjá ráðharranum í matvørumálum, Mariann Fischer-Boel. Hon segði við sjónvarpið, at orðalagið hjá Bent Rulle var heilt burturvið og kann ikki góðtakast.

Danmnark hevði formansskapin í ES, tá nýggju veiðireglurnar vórðu samtyktar, og tað var tí júst danski ráðharrin, sum stóð á odda fyri samráðingunum.

## Eftirlitsmenninir leka ikki

Amerikanarar vilja vera við, at ST-vápnaeftirlitsmenninir í Irak eru ikki nóg tættir, og at iraksku myndugleikarnir tí frammanundan hava fingið at vita, hvar eftirlitsmenninir ætla sær at leita eftir hópoyðingarvápnum. Sambært blaðnum USA Today hava amerikanararnir myndir, sum vísa, at irakar hava tømt vápnagoymslur, beint áðrenn eftirlitsmenninir hjá ST eru komnir hagar at leita.

Men formaðurin hjá eftirlitsmonnunum, Hans Blix, avsannar amerikansku skuldsetingarnar. Við svenska útvarpið sigur Hans Blix, at einki hald er í amerikansku skuldsetingunum. Hann sigur seg eisini ivast í, at amerikansku skuldsetingarnar koma frá fólki í umsitingini.

- Amerikanararnir vita væl, hvussu vit arbeiða, og hvussu trygdarskipanir okkara eru, sigur Hans Blix.

## Ætlaðu at gera geiðslavirkna bumbu

Bretska stjórnin sigur seg hava upplýsingar um, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda ætlaði at gera eina geiðslavirkna bumbu í nítiárunum.

Í hesum bumbuslagnum verður vanligt spreingievni nýtt til at breiða geiðslavirkin evni, og tí er talan ikki um vanligar kjarnorkubumbur.

Ein talskvinna hjá uttanríkisráðnum í London segði í gjár, at bretsku myndugleikarnir hava haldgóð prógv í hesum málinum. Sambært talskvinnuni fingu bretar fatur á próvtilfarinum í einari legu hjá al-Qaeda í Afghanistan. BBC vil vera við, at al-Qaeda var komið longur við bumbuætlanini, enn bretar og amerikanarar hildu, og at felagsskapurin hevði fingið tað neyðuga tilfarið frá Taliban. Felagsskapurin skal eisini hava gjørt ávísar royndir á einari rannsóknarstovu tætt við afghanska býin Herat.

Sambært BBC kunnu bretar prógva, at Osama bin Laden ætlanin at útvega al-Qaeda eina geiðslavirkna bumbu var fremsta málið hjá Osama bin Laden í 1999.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Mandela við hvøssum álopi á George W. Bush

**- USA hevur eittans endamál við at fara í kríggj við Irak, og tað er at fáa ræðið á iraksku oljuni, sigur fyrrverandi suðurafrikanski forsetin**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

- Eg fordømi, at eitt veldi, ið hevur ein forseta, sum ikki dugir at hyggja frameftir, og sum ikki er førur fyri at hugsa, ætlar sær at tveita heimin út í eitt nýtt holocaust, segði fyrrverandi suðurafrikanski forsetin í sínum higartil harðasta álopi á George W. Bush, forseta.

- Hví ber USA seg soleiðis at? Vinur teirra, Ísrael, hevur hópoyðingarvápn, men av tí at Ísrael er ein av teirra sameindu, biður USA ikki ST síggja til, at tey ísraelsku hópoyðingarvápnini verða beind burtur, segði Mandela og legði afturat, at tann irakska oljan er einasta málið við amerikansku álopsætlanini.

Fyrrverandi suðurafrikanski forsetin duldi heldur ikki fyri, at hann heldur lítið um fremsta stuðulin hjá Bush, Tony Blair.

- Tony Blair arbeiðir sum amerikanskur uttanríkisráðharri. Hann er ikki bretskur forsætisráðharri longur, segði mandela og legði afturat:

- Bush arbeiðir uttan um ST, og bæði hann og Blair undirgrava heimsfelagsskapin, ein felagsskapur, sum undanmenninir hjá báðum løgdu lunnar undir, segði fyrrverandi forsetin og friðarheiðurslønarvinnarin.

Nelson Mandela legði afturat, at hann fer at taka undir við øllum tiltøkum ímóti Irak, sum St samtykkir, vísir tað seg, at Saddam Hussein ikki vil samstarva, men hann fer ikki at góðtaka eitt álop uttan ST-heimild. Tað kann ikki góðtakast og hevði verið eitt vánaligt fyridømi fyri heimin, segði hann.

# Tokvanlukka



Níggju fólk doyðu, og 39 fingu skaða, tá eitt tok í Avstralia fór út av jarnbreytini fyrrakvøldið. Í gjár vistu myndugleikarnir ikki, hví tokið var farið útav, men summi av ferðafólkunum vildu vera við, at tokið rendi á eitt ella annað, sum lá á jarnbreytini. Tokvanlukkan, sum var stut sunnan fyri Sidney, er tann ringasta í Avstralia í 26 ár.

# Búskaparligt dapurskygni báðu megin Atlantshavið

**Bæði evropearar og amerikanarar eru dapurskygdir, tá tað snýr seg um tey búskaparligu útlitini, og hvørki evropearar ella amerikanarar hava stórvegis álit á sínum myndugleikum**

BÚSKAPARÚTLIT
*Árni Joensen:*

Amerikanararnir eru longu farnir at gloyma alt um tær stóru fíggjargølurnar við fyritøkum sum Enron og WorldCom, samstundis sum evropeararnir hava minni álit á sínum vinnulívsleiðarum nú enn fyri einum hálvum ári síðani.

Tað sæst í einari kanning, sum varð gjørd á altjóða búskaparráðstevnuni í Davos í Sveits í síðstu viku.

Men eitt er felags fyri evropearar og amerikanarar: Báðu megin Atlantshavið er álitið á ta búskaparligu menningina minkað. Bara 39 prosent av evropearunum og amerikanarunum halda, at tað gongur tann rætta vegin búskaparliga. Fyri bert einum hálvum ári síðani svaraðu heili 56 prosent av teimum spurdu evropearunum og amerikanarunum, at teir vóru nøgdir við tey búskaparligu útlitini.

Kanningin úr Davos avdúkar, at serliga týskarar hava smáar vónir um búskapin í framtíðini. Heili 79 av týskarunum, sum tóku lut í kanningini, siga, at tað gongur tann skeiva vegin við búskapinum.

Samstundis vísir kanningin, at amerikanarar hava yvirhøvur betri álit á sínum vinnulívsfólki, enn evropearar hava. 41 prosent av teimum spurdu í USA siga seg hava álit á teimum, sum standa fyri landsins vinnulívi, men í Evropa eru tað bara 23 prosent, sum siga tað sama um teir evropeisku vinnulívsleiðararnar. Tá evropeararnir fingu sama spurning fyri einum hálvum ári síðani, søgdu 29 prosent seg hava álit á vinnulívsleiðarunum.

Áhugavert er eisini at síggja, at evropearar hava yvirhøvur lítið álit á myndugleikunum í sínum egna landi. Bara 18 prosent siga svara hesum spurninginum játtandi. Ikki tí, amerikanararnir tykjast heldur ikki hava stórvegis álit á sínum myndugleikum. Har svaraðu 27 prosent spurninginum játtandi. Fyri bert einum ári síðani søgdu 46 prosent av teimum spurdu í USA, at tey høvdu álit á sínum myndugleikum.



# Stórur áhugi fyri Norrønu

**Tað er stórur áhugi fyri nýggju Norrønu. Nógvir fyrispurningar og bíleggingar eru komnir. Serliga páskatúrarnir tykjast væl umtóktir millum føroyingar**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*




*Áhugin fyri at sleppa at ferðast við nýggju Norrønu er heilt stórur. Skipið verður væntandi liðugt 20. mars, og fer í sigling beinanveg*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað er heilt stórur áhugi fyri páskatúrunum hjá nýggju Norrønu. Higartil hava meira enn 1.000 fólk tryggjað sær ferðaseðlar aftur og fram til Danmarkar á páskum.

Áki Jespersen, leiðari á skipsdeildini hjá Smyril Line, sigur, at føroyingar tykjast rættiliga spentir upp á nýggja skipið, og nógvir vilja royna tað.

Páskaferðirnar til Danmarkar eru nógv umbidnar. Serliga er tað góða tilboðnum um bilpakkan til Danland á páskum, sum føroingar hava tikið av.

– Tað verður líkasum ein heil føroysk koloni har niðri á páskum, sigur Áki Jespersen. Umleið 250 pakkar av hesum slagnum eru seldir, sigur hann. Tað vil siga, at talan er um eini 1.000 fólk, sum ætla sær páskaferð.

Talan er um eina tilboðsferð fyri tvey vaksin og tvey børn umframt bil. Farið verður úr Føroyum tann 10. apríl og heim aftur tann 17. apríl.

Annars sigur Áki Jespersen, at fleiri tilboð av ymsum slagi fara at koma frá Smyril Line. Eitt nú fer at verða lýst við bilpakkum á øllum farleiðum bæði fyri há- og lágárstíð, sigur hann.

Hann sigur, at tað er ikki líkt til at bruttoprísurin, sum lýstur er, og sum onkur hevur hildið verið í so høgan, hevur forskrekt fólk.

– Tí talan er jú um ein bruttoprís, sum rættiliga ofta verður lækkaður við øllum teimum tilboðum, sum alla tíðina koma, sigur hann.

### Eisini útlendingar

Eisini útlendingar hava víst nbygda skipinum rættiliga stóran áhuga, sigur Áki Jespersen. Tað merkist heilt væl á teimum messum, sum Smyril Line hevur luttikið á uttanlands, eins og umboðsfólkini uttanlands eisini greiða frá tí sama, sigur hann.

Serliga eru tað vanligu, »gomlu« marknaðirnir, sum gera vart við seg. Eitt nú Tyskland, Danmark og Noreg, sum altíð hava verið góðir marknaðir. Sama er við Íslandi, greiðir Áki Jespersen frá. Eisini íslendingar hava verið sera tíðliga ávegis við bíleggingum. Men eisini aðrastaðni úti í heimi hava fólk víst nýggja skipinum áhuga, so alt í alt sær tað bara hugaligt út, sigur Áki Jespersen.

Útlendingarnir eru serliga áhugaðir í summarsiglingini, men Áki Jespersen sigur, at áhugi er eins væl fyri ferðingini lágárstíðina sum fyri háárstíðina.

Summarsiglingin hjá nýggju Norrønu byrjar í Hanstholm tann 10. mei og endar aftur í Hanstholm tann 13. september.

### Gongur eftir ætlan

Tíðin, til nýggja Norrøna skal í sigling, styttist skjótt. Eftir ætlan skal skipið vera liðugt tann 20. mars. Og tað tykist at halda sum er, sigur Áki Jespersen.

Smyril Line hevur fólk á skipasmiðjuni í Týsklandi, har Norrøna verður smíðað, og teir láta væl at, sigur hann. Í løtuni er Norrøna í dokkini, har hon verður málað uttan.

Skipið verður væl útgjørt og í stóran mun rikið av teknikki. Men fólk skal kortini vera umborð. Og tey verða heldur fleiri, enn tey hava verið við gomlu Norrønu.

Tey fara í stóran mun at leggja seg eftir at hava fleiri fólk til at vera um ferðafólkini, sigur Áki Jespersen. Minni verður hinvegin av eitt nú maskinfólki, vísir hann á. Alt í alt roknar hann við at eini 100-120 fólk fara at manna nýggju Norrønu. Tá tey vóru mest við gomlu Norrønu, tað var undir summarsiglingini, plagdu tey at liggja umleið tey 100, sigur Áki Jespersen, leiðari á skipsdeildini hjá Smyril Line.

# Norðmenninir koma á Kyndilsmessu

**Kjølbro Heilsøla, sum er nýtt umboð fyri Mustad framleiðslur, bjóðar teimum báðum norðmonnunum Leif Erich Dørffel, góðskusamskipara hjá O. Mustad & Søn og Svein Erik Bakker, sølustjóra hjá Dyrkorn AS, sum koma til Føroya í komandi viku, at vera hjartaliga vælkomnar**



*Jákup Mikkelsen er stjóri í Kjølbro Heilsølu*

VITJAN
*Tíðindaskriv*

Teir eru komnir at seta gongd á søluna av tí nýggju egningarmaskinuni - Coastal Autoline system - hjá Mustad og at fremja eitt søluátak fyri Mustad húkum og øðrum framleiðslum, herundir svøvlalínurnar, sum Dyrkorn framleiða fyri teir.

Við sær hava teir bæði egningarmskinuna og nýggju stokkarnir - MagPacker - og saman við Poul Andrias Mikladal og Finn Baldvinsson frá Kjølbro Heilsølu, fara teir at sýna skipanina fram á ymsum støðum kring landið, umframt húkar og línur. Føroyskir línumenn fáa á hendan hátt eitt frálíkt høvi at síggja, kanna og meta um skipanina sjálvir og at hoyra eina stutta framløgu um, hvussu skipanin er gjørd, og hvussu hon virkar.

Svein Erik fer at greiða frá, at hendan skipanin - Coastal system - er ein spildur nýggj samansjóðað útgáva av Mustad Autoline skipanini, sum hevur fullautomatiska egning, línu draging og húka skiljing. Hetta ger, at tað slepst undan tíðarkrevjandi arbeiðinum at egna og at beina gamalt agn burtur av aftur húkunum, og at stríðast við fløktar línur, tá túrurin er liðugur. Skipanin ger arbeiðið bæði smidligari og sjálvstøðugari hjá smábátum og meðalstórum fiskiførum, minkar manningina niður í helvt, og gevur tessvegna øktar inntøkumøguleikar.

Sjálvvirkandi línuskipan-in »Mustad Coastal Autoline system« sum veðrur á framsýningini, verður til sølu, og møguleikar verða eisini fyri sertilboðum á bæði húkum og línum.

Ferðin byrjar og endar í Klaksvík, har opið hús verður báðar dagarnar á Kjølbro Heilsølu. Jákup Mikkelsen, stjóri á Kjølbro Heilsølu, sigur, at eftir at hava selt Mustad húkar í mong ár, fegnast hann um at kunna bjóða fullfíggjaðar línuskipanir saman við eykalutum og línum. Hann metir, at hendan nýggja sjálvvirkandi línuskipanin - Coastal Autoline systemˆ endiliga gevur teimum miðalstóru bátunum somu fyrimunirnar, sum teir størru bátarnir hava havt tey seinastu 30 árini.

Hann vísir eisini á, at línufiskiskapur er ein av dygdarbestu fiskihættunum, og í hesum tíðum við avmarkaðum fiskidøgum og ótta fyri minkandi fiskastovnum í framtíðini, eiga allir møguleikar at verða troyttir at útvega línumonnum ta útgerð og tænastu, sum kann lætta um teirra arbeiði og gera tað meira gagnligt.

Leif Erich, sum hevur arbeitt hjá Mustad tey seinastu 28 árini, sigur, at O. Mustad & Søn AS er heimsins størsti húkaframleiðari og heimsins fremsti útvegari av sjálvvirkandi línuútgerð. Felagið hevur selt sjálvvirkandi línuskipanir - Autoline systems - í Føroyum síðani fyrst í 70,unum, tá ið Jógvan á Gørðunum sum tann fyrsti fekk sær hesa útgerð. 30 ár seinni eru nakrir og 30 føroyskir línubátar útgjørdir við Mustad skipanini. Ein av hesum er Grani av Tvøroyri, sum er ein tann besti av føroysku línubátunum.

Mustad er fyri stuttum farin í samstarv við Dyrkorn at framleiða svøvlalínu. Ymisk snið og ymsar longdir og tjúkdir (5,5mm ˆ 11,5mm) við metal ella plast stopparum og við at nýta polyester ella danline/-polyester blandað snøri. Línurnar verða framleiddar á fabrikkini við bryggjuna í Ålesund, har høvuðsstøðin hjá Dyrkorn er.

Svein Erik arbeiðir í Ålesund, har hann hevur arbeitt fyri Dyrkorn farnu fýra árini. Frammanundan var hann verkfrøðingur hjá Mustad í Noregi og kennir sjálvirkandi línuskipaninar - the Autoline Systems - væl og virðiliga. Hann sigur, at Dyrkorn hevur framleitt snøri og fiskireiðskap í meira enn 85 ár og gera sær ómak sjálvir at lurta og læra, hvat kundarnir veruliga ynskja. Dyrkorn broytir framleiðsluna hjá sær áhaldandi, so hon hóska betur til tørvin hjá kundanum. Fleiri og fleiri bátar skifta línu til Dyrkorn.

Svein Erik og Leif Erich fegnast um nýggja samarbeiðið millum Mustad og Dyrkorn, tí teir er sannførdir um, at »samarbeiðið fer at geva okkara kundum tað besta úrvali av línureiðskapi og útgerð á marknaðinum.« Hesin túrurin verður teirra fyrsti í Føroyum, og teir eru sera spentir at koma higar og fáa høvi at tosa við teir føroysku línumenninar um teirra royndir og serligu áhugamál.

Poul Andrias Mikladal, sum hevur ábyrgdina av at samskipa hesa norsku vitjanina, hevur sett tíðarætlanina (sí lýsing aðrastaðni í blaðnum), sum verður fylgd í vikuni, sum teir vitjandi eru í landinum. Hann sigur, at bilurin hjá Kjølbro Heilsølu verður á ymsu støðunum frá kl. 9 til 18 allar dagarnar í komandi viku, og fyrilestrarnir hjá norðmonnunum verða kl. 10 og 15, saman við onkrum til ábits. Men um onkur ikki kann koma til ásettu støðini, eru teir vælkomnir at ringja til hansara, nær tað skal vera á 21 62 70, og avtala tíð til at síggja útgerðina.

